Fróðskaparsetur Føroya

28. oktober 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 9/2005

Tíð: Hósdagin 27. oktober 2005, kl. 13.00-15.45

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

## Dagsskrá:

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 8/2005 setursráðsfundi 29. september 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

## Mál at taka støðu til / umrøða:

3. **Endaligt býti av fíggjarjáttan 2005.** (J.nr. 0015-01365). *Fundarskjal: Uppskot til býti, dagfest 27.10.05, 10 s.* Setursskrivarin greiddi frá broytingunum í fíggjartørvinum. Uppskotið til býti samtykt. Bræv um endaliga býtið verður sent deildunum.

4. **Samstarv við Sjúkrarøktarfrøðiskúlan**. (J.nr. 0013-01553). *Fundarskjøl: Fundarfrágreiðing frá fundi 20.10.2005. 1 s. og notat, undirskrivað av rektarunum, sama dag 1 s.* Rektarin greiddi frá málinum. Setursráðið er prinsipielt positivt fyri eini samanlegging av stovnunum báðum. Enn eru tó nógv viðurskifti, sum mugu útgreinast og nógvir spurningar avklárast, áðrenn talan kann verða um, at Sjúkrarøktarfrøðiskúlin kann verða ein megindeild á Fróðskaparsetrinum. Mælt varð til at arbeiða víðari við málinum, men at fara varliga fram. Biðið varð um, at ein greiður arbeiðssetningur varð gjørdur fyri nevndararbeiðið, sum er skotið upp í notatinum frá rektarunum báðum. Setursskrivarin kunnar Mentamálaráðið og Sjúkrarøktarfrøðiskúlan um støðuna hjá Fróðskaparsetrinum til málið.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Umbygging av Lindbergs Húsi.** (J.nr. 0036-00342). Setursskrivarin greiddi frá tørvinum og ætlanunum. Tosað varð um framtíðarætlanir og møguleikar í húsinum. Setursráðið samtykti at loyva eini umbygging og at fíggja hesa við peningi frá Búrúmskontuni. Setursskrivarin kunnar setursráðið um endaligu umbyggingarætlanina, áðrenn arbeiðið verður sett í gongd.

6. **Ábyrgd í sambandi við granskingarverkætlanir. Mannagongdir fyri ígongdsetan og eftirliti.** (J.nr. 0050-01726). Í sambandi við eitt aktuelt mál reisti setursskrivarin spurningarnar, hvør hevur ábyrgd av at fáa møgulig loyvir til granskingarverkætlanir á Fróðskaparsetrinum og hvussu karmarnir fyri gransking eru skipaðir. Staðfest, at tað er einstaki granskarin, sum hevur ábyrgdina av granskingarverkætlanum og at øll neyðug loyvi fyriliggja. Deildarleiðslan hevur eftirlitsskyldu og -myndugleika. Mælt varð til, at deildirnar við jøvnum millumbilum gjøgnumganga granskingarøkini til tess at tryggja, at formligu viðurskiftini er í lagi. Samtykt at heita á Dátueftirlitið um at hava ein kunningarfund fyri granskarunum um lógina um viðgerð av persónsupplýsingum og tilhoyrandi regluverk. Setursskrivstovan avgreiðir málið.

7. **Skal altjóða summarskeiðið halda fram og undir hvørjum formligum rammum? Fyrispurningur frá Føroyamálsdeildini.** (J.nr. 0040-01727). Setursráðið var samt um, at summarskeiðið er eitt sera væleydnað tiltak, sum avgjørt eigur at halda fram og møguliga víðkast til hinar deildirnar eisini. Setursráðið tók til eftirtektar, at tað ikki eru nóg greiðir karmar fyri skeiðið fíggjarliga og skipanarliga. Samtykt at biðja Zakaris S. Hansen, Sáru Joensen og Anniku Sølvará gera eitt tilmæli um skipan og fígging av altjóða summarskeiðum í framtíðini við støði í royndunum higartil.

8. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 3.10.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 25.10.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

9. **Valnevndin hevði val av studentaumboðum til megindeildarráðini lestrarárið 2005/06 26. oktober 2005.** (J.nr. 0011-01708).
**Úrslitið av valinum gjørdist:**
**Á Náttúruvísindadeildini vórðu Noomi Gregersen og Rani á Lofti vald, og Jaspur Guttesen varð valdur sum eykaumboð.**
**Á Søgu- og Samfelagsdeildini vórðu Sigfríður Abrahamsen og Jógvan Jacobsen valdir uttan val.**
**Á Føroyamálsdeildini stillaði eingin upp, deildarráðið hevur sostatt onga studentaumboðan hetta lestrarárið.**
**At staðfesta.** Staðfest.

10. **KT-reglur at staðfesta:**
***Reglur um nýtslu av KT-skipanum á Fróðskaparsetri Føroya, 25.10.2005***
***KT-trygdarpolitikkur hjá Fróðskaparsetri Føroya, 25.10.2005***

***Felags leiðreglur fyri starvsfólk og lesandi fyri nýtslu av KT-skipanum á Fróðskaparsetri Føroya, 25.10.2005.*** (J.nr. 0038-01573).
Onkrir spurningar vóru til uppskotini. Málið útsett til komandi fund.

11. **Próvdómaragóðkenningar. Náttúruvísindadeildin biður um góðkenning av hesum próvdómarum: Ólavur Ellefsen, M.Sc., stjóri í Simprentis Ltd. (UK) í *Verkætlan innan kunningartøkni* og Padmini Dalpadado, Ph.D. í fiskalívfrøði, Universitetet i Bergen í *Havlívfrøði*. At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

**Kunningarmál:**

12. **Mánaðarjavni ultimo september 2005, nýtsla fyri alt setrið 13.188.000 kr = 69,2% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).

13. **Australski sendiharrin í Keypmannahavn, Mr. Matthew Peek, vitjaði Fróðskaparsetrið og Altjóða Skrivstovuna 11.10.05 saman við Kate Sanderson frá Løgmansskrivstovuni og Kristionnu Sjóvará Jacobsen frá Mentamálaráðnum. Rektarin, vararektarin og Holger Arnbjerg tóku ímóti.** (J.nr. 0019-01711).

14. **Semjan, sum varð gjørd 20.10.05 millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið, ber m.a. í sær, at stovnurin skal leggja strategiska ætlan, og at starvsfólkini skulu førleikamennast.** (J.nr. 0020-01725). Setursskrivarin greiddi frá avtaluni og hvørjar avleiðingar semjan fær fyri leiðslu og starvsfólk á Fróðskaparsetrinum.

15. **Ráðstevna í Odense 21.-22.11.05 "Norden i verden – verden i Norden. Globaliseringens utfordringer til høyere utdanning", sum Norðurlandaráðharraráðið skipar fyri. Rektarin og setursskrivarin luttaka.** (J.nr. 0057-01719).

16. **NUAS-stýrisbólkurin hevur aftaná innbjóðing frá rektaranum og setursskrivaranum gjørt av at halda ársfundin aug. 2007 í Føroyum.** (J.nr. 0014-01720).

17. **Ársfrágreiðing 2004, Facts and Figues 2005, faldari 2005. Aarhus Universitet.**

18. **Beretning 2005, Rigsombudsmanden på Færøerne.**

Frágreiðing: Annika Sølvará